# Manskórið á Ytstu Trom



*Frits Johannesen*

Lítið var um bóndan eftir síðstu jólakonsert. Hann var ovurfegin um konsertina í Njardalsvík 1. sunnudag í advent í fjør , sum mundi vera besta konsertin, sum kórið hevði havt higartil, men nalvabrokkur bóndans var ein bági fyri hansara musikalsku gongd í tónleikaheiminum. Hann var rivnaður á jólakonsertini, og nú var vorðið ringt skil í musiska heiminum í Múlavík. Bóndin var eitt sindur inntonktur og hevði ampað av nalvabrokkinum . Jenny í Miðtúni hevði ilt av bóndanum í hansara sváru pínu og rætti konuni og honum eina hjálpandi hond á ymsan hátt. Bakaði fyri tey, stoppaði onkrar hosur og hjálpti til í fjósinum væl stuðlað av Lítla Maxi, sum gjørdi, sum Jenny bað hann gera. Tey vóru sum stúkan og rekkjuvágin.

Bóndin vitsti , sum var, at hann mátti aftur leggja seg undir skurð, men hann kvíddi fyri at verða lagdur undir fulla narkosu, sum kundi føra til, at hann misti ljómin í rødd síni. Hetta var hent mangan áður at góðir sang-arar, sum vóru lagdir undir fulla narkosu, fingu eina avskeplaða rødd eftir slíka skurðviðgerð. Hetta vildi hann treyðugt.

Millum jólanna fór bóndin suður á ambulatoriið í høvuðsstaðnum at verða kannaður fyri brokkin, sum lá í ein útsynning frá sjálvum nalvanum. Hetta sást tíðiliga, tá ið hann lá í songini, sum vendi beint suður og norð, har sum konan og hann høvdu sovið í eini 40 ár. Hann helt fyri so skemtiliga, tá ið sangaravinirnir Lítli Max, Tubbaks Per, Hindemann, Svana Pól og Jenny í Miðtúni komu á gátt, at hann nevndi brokkin fyri Útsynningsbrokkin. Hann lá á landgrunninum kring nalvan.

- Halgafaminda tínar- mumlaði Tubbaks Per, - Jenny skuldi gjørt eina jólakaku til komandi jól við jólanalvabrokki bóndans sum prýði, og so kundu vit havt kakutombola:- Útsynningsjokolátubrokkur á nalvalandgrunni hjá Tórmóði bónda, skuldi kakan itið. Hetta hevði verið eitt listimeti!!! Øll læðu , men bóndin mátti ansa sær og flenti við spískum munni og helt um sín kæra útsynningsbrokk! – Eitt er skemt, men tað er ikki rætt at gera grin burtur úr bóndanum. Eitt veit eg, fáa vit ikki sett brokkin upp á pláss, verður eingin sangur í Múlavík komandi vár, segði Jenny.

Bóndin hevði svára pínu, tá ið hann kom á ambulatoriið. Hann setti seg í bíðihølið og hugsaði um Manskórið á Ytstu trom og vánirnar í komandi ári fyri hesum vala kóri. Knappliga hoyrdi hann navn sítt nevnt. Hann reistist úr sæti og fór inn í rúmið, har læknin sat í hvítum kitli og grønum buksum.

– Góðan morgun. Tú ert so hvítur sum fannarkavi á hávetri og grønur sum líðin á hásumri. Tað hevði verið líkari, at bøndurnir gingu so klæddir og ikki tit, sum skera upp mannakroppar og seyma upp nalvabrokkar!

Læknin, sum var sunnan av landi skotin, læði so hjartaliga. - Ja, lat okkum skifta um búna. Tú fært hvíta kittilin og grønu brókurnar frá mær, og eg fari í morreyða kotið hjá tær og svørtu knæbuksurnar, so kunnu vit taka eina mynd av okkum og leggja hana út á alnótina...... Ja, og nalvabrokkin við!

Læknin sat og dálaði um bóndan, segði einki, men sat við vatnrunnum eygnahvarmum og hugdi út undan brúnum við mimandi eygum og í eini afturundirgerð av streymandi tonkum, sum runnu saman í einum vaðgoti, og so datt úr honum. – Tormóður, tú ert so heivur sum svartbakur, eg haldi, eg leggi teg upp á borðið og skeri teg beinanvegin -. Tað fór sum ein eldur ígjøgnum bóndan. Hann sá seg sjálvan liggja í fullari narkosu á tí smæla sjúklinga skurðbrettinum , ið var væl minni enn eitt flettingarborð. Ikki størri enn strúkibretti. - Her høvdu hagaveðrarnir ikki kunnað verið svavdir, kanska ein neisti av einum tvílembulambi hevði riðið svavingina av sær á hesi skoldaðu skurðfjøl. Harra mín Guð, sum hetta kom dátt við, hugsaði bóndin, men kanska var hetta tað frægasta, sum henda kundi,. Kanska hann slapp undan at verða lagdur undir ta ørkymlandi narkosuna.

– Tú leggur teg upp á borðið og loysir upp fyri nalvanum, so eg kann koma framat, hoyrdi hann læknan mæla. – Verði eg lagdur undir narkosu? – Nei, eg stingi fýra ferðir kring nalvan við eini sproytu, og so skeri eg. Tú merkir einki.- Lova verði Maria moy og øll halgimenni á hesi grønu jørð, hugsaði Tormóður.

Bóndin mannaði seg upp og fór upp á borðið. Nalvaverkini gingu bóndanum nær. Striltið gekst at koma upp á hetta læknaliga kryvjingarborð, men væl hjálptur av sjúkrasystrini kom hann í sínum treða upp á flettingarborðið. Hann knepti morreyðu troyggjuna, skjúrtuna og stúkuna upp og buksukvarðan niður. Nalvabindið úr Miðtúnið kom undan. Hetta søguliga bind. Sjúkrasysturin hjálpti væl til at at fáa alt at rigga, so skurðviðgerðin gjørdist so ómakaleys, sum til bar. –

Á, Harrans malargrót, læt í læknanum. - Hetta er jú eitt elligamalt nalvabind. Hetta slagi av gasi brúka vit ikki longur. Hvaðan úr Guðs grøna garði stavar hetta ? Bóndin harkaði og greiddi læknanum frá Jenny í Miðtúni, hennara umsorgan fyri sær og sínum, manskórinum og Christian 10. og gamla nalvabindinum, sum faðir hennara hevði borið, tá ið Chr. 10 seinastu ferð var í Føroyum og ta síðstu konsertina, manskórið hevði havt í Njardalsvík, tá ið brokkurin rivnaði aftur, og lukkutíð fekk hann fyri aðferð nalvabindið til láns frá vinkonuni Jenny í tí sváru støðu, sum hann var komin í.

- Gamalt nalvabind og gamal brokkur, sum er rivnaðaður aftur! Tað sær út til, at tað kundi havt verið jarðskjálvti í bóndans krovi upp undir jól. Hevði bóndin trinið dansin til jóla, ella tikið jólaseyð, hevði eg skilt tað, at tað kundi elvt til henda kjøtliga jarðskjálvta. Fáa brokk sum kórleiðari upp undir jól er óhoyrt. – Ja, læknin, hetta er aðru ferð at svá er!

Bóndin segði frá jólakonsertini í Njardalsvík upp undir jól, hvussu góð hon var, um Jenny, um Lítla Max, Tubbaks Per, Svana Pól og Hindemann, sum hevði sungið bass í einum manskóri í Los Angeles, sum æt Te Deum og nú var solosangari og 2. bassur í kórinum. Hann var ringur at syfta!

Áðrenn bóndin visti av, hevði knávi læknin sunnan av landi við sínum kubbutu kjøtfingrum rent nálina fýra ferðir í Útsynningsbrokk bóndans. Alt gekk upp á stás. Einki fall av. Bóndin lá og greiddi frá seyði og seyðahaldi, um sín áhuga fyri tónleiki og kórsangi. Hann frøddist yvir, at hann bert var doyvdur í einum stað. – Hvussu sær út, læknin? – Brokkurin líkist einum spikstykki við góðum undanskurði. - Ja, tað vildi eg meint. Eg kundi kanska tikið hann norður við mær og hongt hann upp at ræsa? – Nei, ikki mást tú tað. Skilið hevði verið ringt, um bóndans hundur legði eftir Útsynningsbrokkinum undir takskegginum.Tað hevði ikki verið niðuraftur lagt.

Tormóður bóndi kundi ikki bara sær og flenti hjartaliga, men mátti ansa sær, so brokurin ikki fór í hesum skriðulopi. Honum dámdi væl henda skurðlækna. Hann var so samanstúvaður. Høvur, hálsur og herðar runnu saman í eitt, og kundi maðurin eins væl verið bæði bóndi og rokskipari. Hann var skemtingarsamur. Meðan hann fletti nalvabrokkin, flenti hann, tosaði, gapaði eitt sindur, hirsaði við herðunum. Hvørt rivjabein livdi í honum, so bringubreiður hann var. Tormóði dámdi væl at liggja her á hesum heimsins teprasta flettingarborði undir knívi hjá hesum bygdasliga læknaliga heimsspekingi. Hetta var eitt satt upplivilsi, og hann kendi ongan sviða enn av skurðviðgerðini.

Tá ið eitt korter var runnið, var skurðviðgerðin liðug. – Ja, nú kanst tú reisa teg aftur og sveiggja taktstokkininum. Sjúkrasysturin, sum hevði gingið læknanum til handa, hjálpti bóndanum av aftur borðinum. Tormóður hugsaði, at kanska skuldi hann liggja her eitt ella tvey døgn, men so var ikki. – Hvat nú læknin? Skal eg inn í aðra stovu at liggja?- Nei, far tú norðuraftur. Far væl við tær nakrar dagar og bint frið, men tú mást fáa nøkur pund av kroppinunm. Eg eri vísur í, um tú ikki ber tað so í bandi, fer brokkurin aftur, tá ið tú ríður várkonsertina av tær. Tú veitst, hvussu tað er at seyma eina feita rullupylsu.- Á, læknin, nevn ikki rullupylsu! Eg havi svøltað í tveir dagar, og rennur nú vatn úr tonnunum, bert við orðið rullipylsa, so hungurstungin eg eri! Kann eg seta meg í bilin og koyra heim sjálvur? – Ja, tað kanst tú gera, men ger ikki ov nógv av. Tú beit merki í, at vit tóku nakrar digitalmyndir av brokki bóndans, tí brokkurin var heldur sjaldsamur á at líta – líktist eitt sindur George Bush tí yngra og Mao formanni. Hann hevði hesi samankiptu eyguni., sum báðir hesir knarkarnir hava, so eygagóður brokkur bóndans var. Vit brúka hetta í undirvísingini. Myndirnar verða lagdar út á heimasíðu okkara: www.skur.com" www.skur.com Tú kanst siga hetta við kórfelagar tínar, at teir kunnu kanska síggja alla skurðviðgerðina á hesi heimasíðu. Vóni ikki, at bóndin hevur nakað ímóti hesum. – Á tegi! Er tað satt! Hann komi til mín! Ja, tað verða ikki bara mínir sangvinir, ið fara at líta at hesari fletting. Kanska fer hetta so víða, at hvør kinesari og indari fer at skoða nalvabrokkin. -. Ja, hvør veit? Onkur mannaátari á Papa New Guine fer at munga, tá ið hann sær henda leskiliga bita við undanskurðinum, segði læknin.